Donsku blø›ini skjóta eftir føroyingum

Ta› vóru ikki mjúk or›, sum føroyska samrá›ingarnevndin og føroyingar annars fingu vi› eftir sær leygarmorgunin í lei›arunum hjá teimum f‡ra størstu donsku morgunblø›unum

SAMRÁ‹INGAR
Rúnar Reistrup

Øll tey f‡ra størstu donsku morgunblø›ini, Jyllands Posten, Berlingske Tidende, Politiken og Aktuelt brúktu leygarmorgunin sínar lei›araspaltur til at koma vi› vi›merkingum um samrá›ingarnar millum føroyska landsst‡ri› og donsku stjórnina, i› sum kunnugt slitna›u hóskvøldi›.

Og eins og eftir hini tr‡ samrá›ingarumførini var tónin mótvegis føroysku samrá›ingarnevndini, og stundum eisini føroyingum sum heild, ikki serliga blí›ur eftir fjór›a og seinasta samrá›ingarumfari›.

Summi av blø›unum undra›u seg á grundgevingina hjá føroysku samrá›ingarnevndini fyri at slíta samrá›ingarnar, me›an okkurt bara undra›i seg á føroysku politikararnar sum heild.

Politiskt óbúnir føroyingar

Ta› bla›i›, i› hev›i størstu kanónirnar frammi leygarmorgunin, var Jyllands Posten, sum alt samrá›ingartí›arskei›i› hevur stu›la donsku stjórnini fult og heilt í hennara handfaring av stø›uni.

Undir yvirskriftini »Storhedsvanvid« n‡tir bla›i› millum anna› høvi› til at skjóta eina kúlu eftir tí óhepna leikluti, sum føroysku fólkatingsumbo›ini fingu undir donsku stjórnarskipanini eftir farna fólkatingsval.

Vi› or›unum: »Det var netop færingernes trang til at blande sig i Danmarks indre anliggender - som sædvanligt for egen vindings skyld - der ved det seneste valg sikrede Poul Nyrup Rasmussens forbliven som statsminister« letur bla›i› føroyingar vita, at solei›is koma allar dárager›ir einafer› aftur um brekku, og broti› endar vi› einum ynski um at »de sælvstændighedsivrige færinger« nú hava lært at halda fingrarnar frá komandi donskum stjórnarskipanum.

Politiska hegni› hjá løgmanni og landsst‡rismanninum í sjálvst‡rismálum fær eisini eina yvirháling frá Jyllands Posten, i› heldur, at føroysku samrá›ingarlei›ararnar frá byrjan hava víst at teimum vantar ta grundleggjandi politisku búgving, i› krevst fyri at handfara eitt so stórt mál sum loysingina frá Danmark.

Kallsberg og Hoydal møsna

Politiken brúkar fyribirgdi› »Tågesnak« sum yvirskrift í sínari vi›merking til seinasta samrá›ingarumfari› á hesum sinni millum stjórnina og landss‡ri›.

»Tågesnak«, sum á føroyskum stutt sagt merkir møsn, sipar í lei›aranum hjá Politiken til grundgevingina hjá føroysku samrá›ingarnevndini fyri at slíta samrá›ingarnar.

Bla›i› er av teirri fatan, at ein avtala um føroyskan sjálvavger›arrætt ikki var nøkur fortreyt, men hinvegin sjálvt máli› vi› teimum sjey mána›ar longu samrá›ingunum millum donsku stjórnina og føroyska landsst‡ri›, og ger vart vi›, at føroyska grundgevingin fyri at slíta samrá›ingarnar tískil er at rokna sum møsn í sunnaru helvt av ríkisfelagsskapinum, sum bla›i› málber seg.

Aktuelt mælir til n‡val

Berlingske Tidende lat stóru or›ini liggja eftir í lei›aranum leygarmorgunin, men n‡tti tó høvi› til eisini at undrast um atbur›in hjá føroysku samrá›ingarnevndini. Bla›i› kallar tilbo›i› hjá donsku stjórnini um f‡ra ára skiftistí› fyri »vinarligt« og avtrappandi blokkstu›ulin hesi f‡ra árini fyri eina »gávu« og skilir ikki at føroyska samrá›ingarnevndin fer heim í illsinni.

Bla›i› loyvir sær tó at gera gitingar um at stø›an, sum nú er íkomin, er úrslit av einum ynski frá føroyska landsst‡rinum um at fáa okkurt slag av samanbresti í lag millum Danmark og Føroyar undan fólkaatkvø›uni um loysing komandi ár.

Aktuelt er eisini av teirri ásko›an, at føroyska kravi› um at danska stjórnin vi›urkendi føroyskan sjálvavger›arrætt bert var ein máti hjá føroyska landsst‡rinum at fáa sær eina undanførslu fyri at slíta samrá›ingarnar. Aktuelt sigur kravi› frá føroysku andstø›uni um n‡val vera væl skiljandi. Bla›i› heldur at tá føroyska landsst‡ri› nú hevur sett seg sum garant fyri at skapa eitt betri grundarlag undir loysingini, so átti ta› at tiki› avlei›ingarnar og lati› veljaran koma til or›ana, nú ta› ikki eydna›ist at halda sítt lyfti.

Sjónarmi›ini sum tey f‡ra stóru donsku morgunblø›ini bóru fram leygarmorgunin vóru sum heild umbo›andi fyri ta› uppfatan, sum danskir fjølmi›lar hava bygt síni tí›indainnsløg á teir tveir dagrnar, sum samrá›ingarnar millum donsku stjórnina og føroyska landsst‡ri› var høvu›sevni í tí›indaflutninginium.

Undan fjór›a samrá›ingarumfari var so at siga einki gjørt burturúr, men so skjótt ta› spurdist, at luftin kring samrá›ingarbor›i› var kaldari en nakrantí› á›ur, var› nógv ljós kasta› á tær nú slitna›i samrá›ingarnar.

Vit hava gó›a tí›

- Fyri okkum kann n‡ggja vaktar- og bjargingarskipi› ver›a liggjandi í Noregi so leingi ta› skal vera, sigur forma›urin í Føroya Maskinmeistarafelag

BRIMIL
Áki Bertholdsen

-Vit hava gó›a tí›. So fyri okkum kann Brimil ver›a liggjandi í Noregi so leingi ta› skal vera.

Finnleif Guttesen, forma›ur í Føroya Maskinmeistarafelag fær ikki nervar av ósemjuni ímillum Fíggjarmálast‡rinum og manningarfeløgini um sáttmálan hjá teimum, sum skulu sigla vi› n‡ggja vaktar- og bjargingarskipinum.

Hann sigur lønin hjá teimum, sum sigla vi› Vaktar- og Bjargingartænastuni er alt ov lág, og nú ein n‡ggjur sáttmáli skal gerast fyri Brimil, er ta› greitt, at teir vilja hava hana upp.

Hann vil ikki siga, hvørji krøvini eru, men hann sigur, at lønin er so lág nú, at ta› er láturligt í eygunum á maskinmeistarum úttanlands, sum teir hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni kunnu samanbera seg vi›.

- Eg haldi, at okkara krøv eru rímilig. Ver›a tey gingin á møti, ver›ur lønin hægri enn í summum av hinum sáttmálunum, vit hava. Men hon ver›ur framvegis lægri enn í ø›rum sáttmálum, sum vit eisini hava.

Hann vi›gongur, at orsøkin til, at maskinmeistararnir eru komnir í hesa stø›una, er, at teir hava ikki veri› nóg dugnaligir at fáa lønina hækka›a tey seinastu árini.

- Har mugu vit taka í egnan barm, men ta› mugu vit so rætta nú.

Og hann dylir heldur ikki fyri, at Brimil er eitt kærkomi› høvi til at fáa gjørt naka› munagott vi› lønina. Hann heldur ikki, at tr‡sti› liggur á maskinmeistarunum at fáa tann n‡ggja sáttmálan undir land.

- Tr‡sti› liggur hjá Landsst‡rinum, tí maskinmeistararnir kunnu altí› fáa størv vi› betri løn, enn teir kunnu fáa hjá Vaktar-og bjargingartænastuni. Vit taka ta› púra róligt, tí hvat okkum vi›víkur hevur ta› ikki skund at fáa Brimil heim.

Hann sigur, at ta› skulu vera tríggir mans í maskinuni á Brimli, tveir vi› fullari útbúgving og ein maskinistur.

Men fíggjarmálast‡ri› sigur jú, at ta› er ikki n‡ggjur sáttmáli, sum samrá›ast skal um. Ta›, sum hettasn‡r seg um, er at finna ein lønarbólk í sáttmálanum sum er, at løna menninar eftir?

-Ta› er skeivt. Fyri okkum er ta› ongin ivi um, at ta› er ein n‡ggjur sáttmáli, sum vit skulu samrá›ast um. Ta› hava vit eina lógfrø›iliga váttan fyri og hesari váttan hevur Fíggjarmálast‡ri› ikki mótmælt.

Hann vísir eisini á, at ta› er Fíggjarmálast‡ri›, sum hevur skyldina av, at hendan setø›an er íkomin.

- Tá i› sáttmálasamrá›ingar vóru seinast, ætla›u vit at gera sáttmála fyri Brimil, men ta› vildi Fíggjarmálast‡ri› ikki. Men nú vísir ta› seg so, at teir hava biti› seg sjálvar í halan.

Strí›i› hert

Strí›i› um Brimilin er nógv hert seinastu dagarnar og m.a. hevur Fíggjarmálast‡ri› ste›ga› lønunum til menninar á n‡ggja Brimli.

- Sostatt er verkbann sett í verk ímóti okkum og ta› fara vit eisini at mótmæla. Og eins og Skipara- og Navigatørfelagi›, hava eisini vit tiki› fyrivarni fyri at seta tiltøk í verk, sum fara at raka alla Vaktar- og Bjargingartænastuna. Vit hava eisini tiki› fyrivarni fyri at krevja endurgjald fyri, at lønin er ste›ga›.

Finnleif Guttesen sigur, at ta› kann hugsast, at ta› kemur hartil, at ta› ver›ur ney›ugt at seta tiltøk í verk, sum kann raka hini skipini, eins og Vaktar- og Bjargingartænastuna annars. Men enn er ta› ikki upp á tal.

Finnleif Guttesen, forma›ur í Maskinmeistarafelagnum